# Guðrið íslendskt idol

**Guðrið Hansen av Argjum eru í løtuni at síggja í íslendsku útgávuni av sangkappingini Idol**

IDOL
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Hetta við at føroyingar luttaka í tónleikakappingum uttanlands er vorðið alsamt meira vanligt. Tað hevur higartil mest verið leitað til Danmarkar, men 23 ára gamla Guðrið Hansen av Argjum roynir seg í hesum døgum í tónleikakappingini Idol í Íslandi.

Heili 1.400 fólk møttu upp til fyrstu upptøkuroyndina, og nú bert níti eru eftir, er føroyska Guðrið framvegis at finna millum luttakararnar.

Fleiri kenna óivað Idols sendingar hjá TV3, og talan er sum sama fyribrigdið - bert á íslendskum. Hesar sendingar eru eisini í familju við eitt nú Popstars, sum danska TV2 hevur sent og sendir fyri fjórðu ferð í løtuni.

Heitið á kappingini sipar til støðuna sum tónleikastjørnur fáa sum fyrimyndir ella idol. Enn er Guðrið ikki vorðin fyrimynd fyri íslendingar, men tað kann hon gerast.

## Tagnarskylda

- Eg kann einki siga.

Hetta eru fyrstu orðini hjá Guðrið Hansen í telefonini úr Reykjavík. Eins og líknandi kappingar hava luttakararnir fullkomna tagnarskyldu. Tað einasta Guðrið kann hjálpa okkum við eru almennir upplýsingar um kappingina.

- Upptøkurnar byrjaðu í august, og nú eru fimm partar sendir í sjónvarpinum. Síðsti parturin, har vinnarin verður kunngjørdur, verður sendur í januar, sigur Guðrið.

Sjálv hevur Guðrið ikki staðið so heilt nógv á palli í Føroyum. Hon hevur luttikið í Àrsins Songrødd og sungið í kórið, men vit hava ikki sæð nógv til hana sum frontfigur ella idol.

Um sjálva kappingina fær Guðrið ikki sagt okkum stórt annað.

Guðrið er forlovað við einum íslendingi. Hon er stutt síðani byrjað á pedagogskúla í Reykjavík, og hon hevur eisini arbeitt seinasta árið í Íslandi.

Foreldrini hjá Guðrið eru Hans Carl og Louisa Hansen. Pápin, Hans Carl, telist millum stinnastu gittarleikarnar í Føroyum og hevur verið við í nógvum bólkum.



*23 ára gamla Guðrið Hansen telist ikki millum kendastu nøvnini á føroyska tónleikapallinum. Hendan myndin er tikin á Prix Føroyar finaluni í 2001, tá hon sang kór hjá bólkinum Tám. Nú roynir hon seg í íslendsku sangkappingini Idol.*
*Mynd: Jens Kristian Vang.*

## Góð undirtøka

Tað er íslendska sjónvarpsrásin Støð 2, sum sendir Idol í Íslandi. Konseptið eigur Fremantlemedia, sum hevur selt sendingarnar til nógv lond.

Palmi Gudmundsson er PR-Manager hjá Støð 2, og hann sigur, at Idol hevur víst seg at vera ótrúliga væl umtókt í Íslandi.

- Støð 2 er sjónvarpsrás, sum tú mást vera haldari fyri at síggja. Eitt sindur minni enn helvtin av øllum húsarhaldum í Íslandi síggja Støð 2, og ein máting vísti, at 83% av okkara hyggjarum og 53% av samlaðu hyggjarunum í Íslandi fylgja við í sendingunum longu nú, sigur Palmi Gudmundsson.

Hetta er størsta átakið hjá Støð 2 nakrantíð, og tey settu met við heili 1.400 til fyrstu upptøkuroyndina.

- Vit finna eina nýggja íslendska poppstjørnu, sigur Palmi, sum leggur afturat at ongar ætlanir eru um at fara út um Ísland at marknaðarføra komandi stjørnuna.

Sendingarnar verða sendar hvørt fríggjakvøld, og tann átjandi og síðsti parturin verður sendur 16. januar.

Palmi Gudmundsson sigur, at teir hava ikki loyvi til at senda teirra útgávu av Idol í Føroyum.

## Royndir dómarar

Vinnarin av kappingini fær ein plátusáttmála við stóra íslendska plátufelagnum Skífan. Til at gera av, hvør skal gerast næsta idolið í Ìslandi hevur Støð 2 funnið tríggjar dómarar. Mest kendi dómarin er Bubbi Morthens. Hann hevur verið ein høvuðsmonnunum á íslendska tónleikapallinum í meiri enn tríati ár, og hann bæði búð eitt stutt skifti í Klaksvík og spælt fleiri ferðir í Føroyum.

Hinir dómararnir eru Sigga Beinteinsdóttir og Þorvaldur Bjarni Þorvaldsson. Sigga er víðagitin sangari í Íslandi, og Þorvaldur Bjarni telist millum fremstu tónleikaframleiðarar í Íslandi.

Fríggjadagin verður sætti partur av Idol sendir, og tá fæst at vita, um Guðrið framhaldandi verður við, tá hópurin av møguligum idolum verður skorin niður í 32.

Eisini ber til at fylgja við ymsum í sambandi við kappingina á www.stod2.is við at klikkja á idol.





**Okkum tørvar ítróttarskrivara**

Dámar tær ítrótt? Dugir tú at arbeiða sjálvstøðugt og liggur væl fyri at skriva?

So ert tú kanska júst persónurin, sum vit sóknast eftir á ítróttaredaktiónini.

Ítróttaskrivingin hevur seinastu nógvu árini verið raðfest ovarliga á Sosialinum, og fyri framhaldandi at halda fast um oddastøðuna á økinum sóknast vit tí eftir einum medarbeiðara. Talan verður í fyrstu syftu um parttíðarstarv.

Umframt ítróttarskrivingina á Sosialinum verður partur av uppgávuni røkt av navnaøkinum, www. sportal.fo.

Vit rokna við, at tú hevur ein breiðan áhuga fyri føroyskum ítrótti, herundir ikki minst vetrarítróttargreinum. At tú ert álítandi og hevur góðan kunnleika til føroyska málið, og at tú hevur góð evni at bera teg fram á skrift.

Umsøkjarar við journalistiskari útbúgving hava fyrimun, men er hetta tó eingin treyt.

Er ynski at fáa nærri at vita um starvið, eru áhugaðir umsøkjarar vælkomnir at seta seg í samband við Jonhard Hammer á tlf. 223 369 ella Eirik Lindenskov á tlf. 216 409. Ella við at senda teldubræv til jonhard@sosialurin.fo ella eirikur@sosialurin.fo

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 20. oktober 2003

**Umsóknir skulu sendast til:**

Sosialurin
postsmoga 76
110 tórshavn

Merkið brævbjálvan **»umsókn«**

Sosialurin

Sosialurin er eitt livandi og spennandi arbeiðspláss. Her starvast umleið 25 fólk.
Uppgávurnar eru bæði áhugaverdar og fjølbroyttar. Blaðið kemur út fimm ferðir um vikuna.


Bilar

Nr. 196 • hósdagur • 16. oktober 2003 • 77. árg.



*VW Golf innan. Her við navigatiónsskipnan, automatgiri og 2 zone Climatic klimaanleggi*
*Mynd: Volkswagen*

# Nýggjur leiðari í Golf-klassanum




*Nú kemur VW Golf í fimtu generatión síðan 1974. Á myndini eru allir Golfarnir, næsti Golfurin kom í 1983, triði í 1991, fjórði í 1997 og fimti nú í 2003*
*Mynd: Volkswagen*

**Ein av best umtóktu evropeisku bilunum, VW Golf, kemur nú í eini heilt nýggjari útgávu. Bilurin líkist sær sjálvum, og eingin ivi er um at talan er um ein Golf. Vit royndarkoyrdu bilin í Týsklandi seinasta hósdag**

VW Í WOLFSBURG
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin*

**Wolfsburg:** Komandi ár eru 30 ár liðin síðan fyrsti VW Golf sá dagsins ljós í Wolfsburg í 1974. Síðan eru framleiddir yvir 22 milliónir Golfar.

Tá Golf avloysti gomlu VW bobluna í 1974, varð framleiðslan av bobluni flutt til Mexico. Har hava teir so verið gjørdir fram til 31. juli 2003, tá framleiðslan helt uppat. Boblan varð gjørd í yvir 21 milliónum eindum, so talan er um nógv seldar og væl umtóktar bilar.

Hóast nýggi Golf, sum nú kemur í fimtu generatión, er ein heilt nýggjur bilur, er eingin ivi um at talan er um ein Golf. Hetta verður m.a. gjørt, fyri at tey sum eiga ein Golf ikki skulu merkja, at tey eru sett út á eitt síðuspor, og teirra bilur nú er minni verdur, tí eitt nýtt modell er komið á marknaðin. Tað vísir seg, at Golf kundarnir eru sera trúgvir, og bilarnir halda góðan prís sum brúktir.

VW Golf hevur øll árini verið leiðarin í sínum klassa, sum verður nevndur Golf-klassin, og flestu av kappingarneytunum hava brúkt hann sum fyrimynd. Hóast kappingin hevur verið ómetaliga hørð, og aðrir bilar sum eru komnir á marknaðin hava verið nevndir "Golf-killer", hevur Golfurin yvirlivað og er framvegis leiðari í sínum klassa. Í Wolfsburg verður sagt, at tá fyrsti Golf kom á marknaðin í 1974 hevði hann tíggju kappingarneytar, nú hevur hann yvir hundrað.

## Trendline, Comfortline og Sportline

Nýggi Golfurin er vaksin við 5,5 cm í longd, 2,4 cm í breidd og 3,9 cm í hædd. Talan er sostatt um ein størri og rúmligari bil. Serliga aftan er betri beinpláss, og viðførisrúmið er vaksið við 20 litrum til 350 litrar.

Á trygdarøkinum kunnu vit nevna at Golfurin nú hevur seks airbag, og allar fimm nakkapúturnar eru aktivar. Hann hevur t.d. ESP (Electronic Stabilisation Program) og HBA (Hydraulic Brake Assist) og eitt nýtt "multi link" hjólupphang aftan. Nýtt upphang framman og elektromekaniskar róðurgreiðir (Servotronic). Eisini eru nýggir motorar við beinleiðis FSI bensininnspræning og nýggjum 5 og 6 trinsgirkassum.

Golf verður gjørdur í útgávunum Trendline, Comfortline og Sportline. Síðuspeglini hava innbygd blunkljós.

Motorskráin byrjar við 1,4 litur bensinmotorum við 75 hk, síðan er ein 1,6 litur FSI við beinleiðis innspræning og 115 hk, og tveir TDI turbodiesel motorar, annar við 1,9 litur við 105 hk og hin við 2,0 litur við 140 hk . 1,6 FSI og 2,0 TDI hava 6 trins girkassa. Allir motorarnir lúka tey strongu Euro-4 krøvini til umhvørvisvernd.

Eftir at hava royndarkoyrt nýggja Golf´in undir ymiskum umstøðum sum t.d. á krókutum og ósløttum bygdarvegi, í nógvu ferðsluni í býnunum og á týsku motorvegunum er niðurstøðan tann, at talan er um ein sera væl koyrandi bil.

Í forskriftunum til Golf 2,0 FSI við 150 hk stóð, at toppferðin á bilinum var 206 km/t. Bilurin fekk alt hann átti á motorvegnum, ferðin kom upp til nakað yvir 200 km/t í 6. giri. Bilurin var púra tryggur á vegnum, lítið hoyrdist til motorin og hjólini. Elektromekaniska servostýringin lagaði seg soleiðis, at stýringin merkist tyngri og stúttari, so hvørt sum ferðin vaks.

Standardútgerðin í Trendline umfatar m.a. radio við fløguspælara og seks hátalarum, fjarstýrt sentrallás, el-síðurútar, el-síðuspegl við hita, koyriteldu, og rattið kann stillast í hædd og longd. Bilurin fæst eisini við ymiskari eykaútgerð sum t.d. 2 zone Climatic, har tey ferðandi í bilinum ikki nýtast at hava sama hita í høgru og í vinstru síðu. Í bíligastu útgávuni kemur nýggi VW Golf at kosta líka undir 200.000 krónur.



*Hóast VW Golf 2003 líkist sær sjálvum, er talan um ein heilt nýggjan bil við koyrieginleikum í toppklassa*
*Mynd: Volkswagen*